Starvslýsing



# Leiðari til handlarnar hjá FT Samskifti

Ert tú leiðari við áhuga og royndum innan handil og sølu, so stendur eitt spennandi starv tær í boði!

Føroya Tele skal seta nýggjan depilsleiðara í Handilsdeplinum á FT Samskifti.
FT Samskifti mennir, marknaðarførir og selur tænastur og vørur, sum Føroya Tele veitir fyritøkum og einstaklingum. Í Handilsdeplinum eru seks handlar úti um landið við innkeypsmøguleikum og tænastuverkstaði. Tilsamans starvast 33 starvsfólk í deplinum.

Handlarnir eru eitt týdningarmikið andlit mótvegis viðskiftafólki okkara, og tað verður tín uppgáva at fáa handilsdeild okkara at geva kundunum eina fyrimyndaliga tænastu.
Leiðarin skal veita kundunum nøgdsemi og tryggja eina miðvísa framgongd í sølu og úrtøku.
Leiðarin er partur av leiðslutoyminum á FT Samskifti.

**Umsøkjarin skal:**
- Hava viðkomandi útbúgving
- Hava royndir í leiðslu av starvsfólki innan handil, sølu og kundarøkt
- Hava kundan í fokus og tev fyri góðum keypmansskapi
- Síggja møguleikar heldur enn forðingar og trívast við avbjóðingum
- Duga at skipa og fáa fleiri handlar at rigga sum eina heild
- Hava góð evnir at samstarva og samskifta
- Duga at fáa starvsfólk at gera sítt besta

**Arbeiðsinnihaldið**
- Handlarnir hjá Føroya Tele skulu arbeiða eftir einum nýggjum leisti, har heildarráðgeving er kjarnin
- Áhaldandi menna handlar, innkeyp og tænastu
- Vøruútboðið og tænastustøðið skal tillagast málsetningunum um eitt høgt góðskustøði og samstundis skulu handlarnir geva felagnum nøktandi inntøkur
- Leiðsla, planlegging og fíggjarstýring
- Coacha og eggja leiðarum og starvsfólki

**Umsókn og starvsviðurskifti**
Starvið skal setast skjótast gjørligt. Løn eftir avtalu.

Tú fært meira at vita um starvið frá Jan Mortensen, stjóra á FT Samskifti, á tlf. 243301 ella telduposti jmo@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina hjá Føroya Tele.

Umsóknir við CV og prógvum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 22. august 2008. Viðmerk á brævbjálvan "Depilsleiðari til Handilsdepilin".

Føroya Tele
*Starvsfólkadeildin*
*Postsmoga 27*
*FO-110 Tórshavn*

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum...